# Gylti himmalin

**PREMIER LEAGUE** Í kenda sanginum hjá Gerry and the Pacemakers syngja Liverpool viðhaldsfólkini um gylta himmalin, ið er fyri endan av ódnini. Liverpool er at síggja til mitt í ódnini, men spurningurin er nú um nýggju eigararnir, New England Sports Ventures við John W. Henry og Tom Werner á odda, kunnu leiða Liverpooll burturúr ódnini og inn í bláa himmalin. Á vøllinum sær einki út og søguríka felagið liggur næstniðast á stigatalvuni

Tróndur Arge
Liverpool

Høvðussøgan í fótbóltsheiminum seinastu vikuna hevur verið um søluna av Liverpool. Í februar 2007 keyptu Tom Hicks og Geroge Gillett Liverpool. Teir áttu eisini íshockey liðini Dallas Stars og Montreal Canadiens umframt Baseball liðið Texas Rangers. Teir lovaðu nýggjan leikvøll og at styrkja um liðið. Alt hetta uttan at seta felagið í skuld.



*Liverpool leikararnir hanga við høvdinum á Goodison Park. Serliga álops essið hjá teim reyðu, Fernando Torres, tykist hava tankarnar á heilt øðrum staði fyri tíðina*

## Liverpool til sølu

Í apríl 2010 varð Liverpool sett til sølu aftur. Ongin nýggjur leikvøllur, men dagin eftir avgerð ein rættur í Texas, at sølan ikki er farin rætt fram. Fríggjadagin kemur so staðfestingin, rætturin í London avgerð enn eina ferð, at sølan er farin rætt fram, og Liverpool er selt NESV fyri 2,5 milliardir krónur.

## NESV lovar einki

Nýggju eigararnir vóru á Goodison Park í gjár og sóu Liverpool tapa greitt fyri Everton. Teir hava mótsatt Tom Hicks og Geroge Gillett valt at halda kortini tætt at kroppinum og hava ikki sett tøl ella tíðarskeið á nakað. NESV hevur innfríðað skuldina, so felagið er skuldafrítt. Tó hevur John W. Henry staðfest eitt:

– Tað er langur vegur á mál!

Tað segði hann eftir, at rætturin í London hevði givið grønt ljós fyri søluni. Liverpool liggur á 19. plássi og spælið er út av lagið vánaligt. So er spurningurin nær Liverpool kemur fram á gylta himmalin hinumegin ódnina.

*trondur@sosialurin.fo*



*Spaniólin, Mikel Arteta, hevur júst banka bóltin í netið aftanfyri landsmannin, Pepe Reina. 2-o til Everton, ið eisini gjørdist endaliga úrslitið sunnudagin*

## Kríggj í leiðsluni

Fyrr í hesum mánaðinum velur ein meiriluti í Liverpool leiðsluni, Martin Broughton, Christina Purslow og Ian Ayre, at taka av einum boðið frá NESV upp á góðar 2,5 milliardir. Minnilutin, Tom Hicks og George Gillett, meta at prísurin er alt ov lágur og teir gera alt fyri at steðga søluni. Sakin endar í rættinum í London. Meirilutin vinnur, leiðslan í felagnum er at kalla óarbeiðsfør, felagið hevur eina met skuld uppá góðar tvær milliardir krónur, venjarin er í øðini, tí hann ongar pengar sleppur at nýta, og á vøllinum gongur illa. Liverpool endar á sjeynda plássi, røkkur ikki Champions League fótbólti og Roy Hodgson loysir Rafael Benitez av. Inn kemur eisini Martin Broughton, sum verður settur til at finna ein keypara og umsita søluna.

## Hvussu nógv er felagið vert?

Tom Hicks og George Gillett meta felagið verða vert góðar 6 milliardir krónur, meðan Martin Broughton og hinir í leiðsluni meta felagið ikki verða vert meir enn góðar 2-3 millardir. Tað gongur illa at finna nakran keypara og Royal Bank of Scotland, sum umsitur eitt lán hjá Hicks og Gillett uppá góðar tvær milliardir, setur 15. oktobur sum deadline fyri at gjalda skuldina aftur.



*Liverpool venjarin, Roy Hodgson, hevur als ikki havt eina góða byrjan uppá nýggja starvið. Liverpool liggur nú á næstaftasta plássinum í Premier League*

**NESV:**
**NEW ENGLAND SPORTS VENTURES**
var stovnað í 2001 av John W. Henry, Tom Werner, Les Otten og The New York Time Company. NESV eigur og rekur amerikanska baseball felagið Boston Red Sox.

### Enska Barclays Premier League

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | MÁL | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Chelsea | 8 | 6 | 1 | 1 | 23-2 | 19 |
| 2 | Manchester City | 8 | 5 | 2 | 1 | 12-5 | 17 |
| 3 | Arsenal | 8 | 4 | 2 | 2 | 18-10 | 14 |
| 4 | Manchester United | 8 | 3 | 5 | 0 | 18-11 | 14 |
| 5 | Tottenham | 8 | 4 | 2 | 2 | 10-7 | 14 |
| 6 | West Bromwich | 8 | 3 | 3 | 2 | 11-14 | 12 |
| 7 | Bolton | 8 | 2 | 5 | 1 | 12-12 | 11 |
| 8 | Aston Villa | 8 | 3 | 2 | 3 | 9-12 | 11 |
| 9 | Stoke | 8 | 3 | 1 | 4 | 9-11 | 10 |
| 10 | Blackpool | 8 | 3 | 1 | 4 | 13-18 | 10 |
| 11 | Everton | 8 | 2 | 3 | 3 | 8-7 | 9 |
| 12 | Fulham | 8 | 1 | 6 | 1 | 9-9 | 9 |
| 13 | Wigan | 8 | 2 | 3 | 3 | 6-15 | 9 |
| 14 | Newcastle | 8 | 2 | 2 | 4 | 12-12 | 8 |
| 15 | Sunderland | 7 | 1 | 5 | 1 | 7-7 | 8 |
| 16 | Blackburn | 7 | 2 | 2 | 3 | 7-8 | 8 |
| 17 | Birmingham | 8 | 1 | 4 | 3 | 8-12 | 7 |
| 18 | Wolverhampton | 8 | 1 | 3 | 4 | 8-13 | 6 |
| 19 | Liverpool | 8 | 1 | 3 | 4 | 7-13 | 6 |
| 20 | West Ham | 8 | 1 | 3 | 4 | 6-15 | 6 |



## Tíðin hjá Hicks og Gillett í Liverpool

**FEBURAR 2007:**
Tom Hicks og George Gillett keypa Liverpool og lova at byggja nýggjan leikvøll. Spakin skal setast í innan 60 dagar.

**MAJ 2007:**
Liverpool er í Champions League finaluni, men tapur 2-1 ímóti AC Milan. Eftir finaluna lova Hicks og Gillett at venjarin, Rafael Benitez, fær nógvar pengar at brúka upp á leikarar. Millum keypini eru Fernando Torres, Ryan Babel og Yossi Benayoun.

**NOVEMBUR 2007:**
Rafael Benitez og eigarnir kunnu ikki einast um leikarar, ið skulu keypast í komandi flytingarvindeyganum. Benitez er í øðini.

**JANUAR 2008:**
Tom Hicks viðgongur, at hann hevur roynt at fingið Jurgen Klinsmann til at avloysa Benitez. Fjeppara felagið Spirit of Shankly(SOS) verður stóvnað sum eitt mótspæl til Hicks og Gillett.

**JANUAR 2009:**
Rafael Benitez í øðini, tí hann ikki sleppur at nýta pengarnar hann fær fyri at selja Robbie Keane.

**JANUAR 2010:**
Sonurin hjá Tom Hick, sum er nevndarlimur í Liverpool, leggur frá sær. Hann hevur spilt ein Liverpool viðhaldsmann hjá Liverpool út á einum teldupostí.

**APRÍL 2010:**
Tom Hicks og George Gillett seta Liverpool til sølu. Teir fáa Martin Broughton inn í leiðsluna fyri at finna ein keypara og umsita søluna.

**AUGUST 2010:**
Kenny Huang úr Kina og Yahya Kirdi úr Sýria vísa sína áhuga, men einki boð kemur á borðið

**5. OKTOBUR 2010:**
Liverpool boðar frá, at teir hava góðtikið eitt boð frá New England Sports Ventures. Hicks og Gillett gera alt fyri at steðga søluni. Sakin endar í rættinum

**12. OKTOBUR 2010:**
Rætturin í London gevur Liverpool viðhald, samstundis kemur Peter Lim úr Singapor við einum boðið uppá felagið, ið er hægri en tað hjá NESV.

**13. OKTOBUR 2010:**
Ein rættur í Texas gevur Hicks og Gillett viðhald og sølan er fyribils steðgað.

**14. OKTOBUR 2010:**
Rætturin í London staðfestur, at rætturin í Texas onga heimild at steðga søluni.

**15. OKTOBUR 2010:**
Liverpool er selt NESV fyri 2,5 milliardir krónur. Tom Hicks lovar at hetta er ikki endin á hesum málinum.